# SO SPØKIR F AFTUR Í EVR



MYND: POLFOTO

TANN **VÍÐGONGDI HØGRAFLOKKURIN JOBBIK** VAR TANN STÓRI VINNARIN Á FYRRA UMFARI AV UNGARSKA **TJÓÐARTINGSVALINUM**, SUM VAR TANN 11. APRÍL. HARVIÐ TÓK UNGARN EITT RISAFET ÍMÓTI EINARI GONGD, SUM KANN ENDA VIÐ, AT LANDIÐ VERÐUR TANN **FYRSTI FASCISTISKI STATURIN** Í EVROPA Í HESARI ØLDINI. SEINNA VALUMFAR VERÐUR NÚ SUNNUDAGIN



**BAKGRUND**

Árni Joensen
arni@sosialurin.fo

Valið tann 11. apríl var eitt lagnuval, hóast øll vistu úrslitið frammanundan. Mið-høgraflokkurin Fidesz fekk næstan 53 prosent av atkvøðunum og tryggjaði sær stóran meiriluta í tjóðartinginum. Men tann veruligi vinnarin var Jobbik. Á valinum fyri fýra árum síðani fekk flokkurin bara tvey prosent av atkvøðunum, men nú fekk hann stuðul frá næstan 17 prosentum av teimum, sum vóru á vali og gjørdist triðstørsti flokkur í landinum.

– Tí var valdagurin 11. apríl ein dimmur dagur fyri Ungarn. Ja, fyri alt Evropa, skrivar viðmerkjarin Gabi Gleichmann.

Jobbik er ein rasistiskur, høgraviðgongdur og sera tjóðskaparligur fascistaflokkur. Tann 11. apríl atkvøddi sætti hvør veljari í Ungarn fyri einum populistiskum flokki, sum alment mælir sínum stuðlum til at hata romarar, jødar og »fremmand«, og hvørs mál er at broyta ungarska landamarkið við at skipa eitt Stór-Ungarn og at skriva ta evropeisku søguna av nýggjum.

Valúrslitið var ein vanlukka, sum kann fáa ræðuligar avleiðingar - ikki bara fyri Ungarn, men eisini fyri umheimin.

Tá atkvøðurnar frá seinna valumfari eru taldar, og tað samlaða valúrslitið liggur á borðinum, verður fyri fyrstu ferð í demokratisku søgu Ungarns sætti hvør tingsessur mannaður við umboði fyri ein flokk, sum í sínari grundhugsjón vil seta demokratiið úr gildi og seta einaræði ístaðin fyri.

Men hvussu er Ungarn endað í hesi óhugnaligu og syrgiligu støðu, spyr Gabi Gleichmann.


MYND: AFTENPOSTEN

*Hóast myndugleikarnir hava sett forboð fyri skrúðgongunum hjá Ungarsku Garduni, halda tær fram*

## Fortíðarinnar skuggar

Ta fyrstu tíðina, eftir at Berlinmúrurin var fallin í 1989, var støðan í Ungarn eins og aðrastaðni handan tað gamla Jarntjaldið merkt av kæti og lætta. Fyri fyrstu ferð í fólksins 1100 ára longu søgu fingu borgararnir frælsi og við tí trygd fyri øllum menniskjaligum rættindum. Hetta var ein góð tíð, har fólk dusaðu sær í teimum vælsignilsum, sum demokratiið hevði við sær, og búskapurin gekk tann rætta vegin.

Tann nýggja tíðin gav eisini rúmd fyri einum fjølbroyttum politiskum ráki, men saman við øllum tí nýggja komu eisini teir gomlu skuggarnir frá fortíðini upp á tann politiska himmalin. Í tí nýggja demokratiska samfelagnum tóku sterkar kreftir seg saman og tilevnaðu eina politiska hugmyndafrøði, sum bygdi á eina fascistiska hugsjón, ið bleiv kryddað við einari sera hættisligari tjóðskaparuppfatan við rasistiskum ískoyti. Men teir, sum stóðu ovast í tí politiska landslagnum, undirmettu evnini hjá teirri nýggju rørsluni at fáa samband við fólkið.

Í 2006 bleiv Ungarn skelkað av einari bandupptøku, har landsins leiðari upplýsti, at stjórnin hevði logið fyri fólkinum. Tað endaði við teirri ringastu kreppuni síðani tað politiska skiftið 17 ár frammanundan. Í Budapest savnaðust fólk í gøtunum at vísa sína misnøgd, og fleiri hundrað vórðu løstað í bardøgum við løgregluna.

## Góð gróðrarlíkindi

Í altjóða búskaparkreppuni í 2008 bleiv Ungarn sera meint rakt. Í veruleikanum var landið um at fara á húsagang og noyddist at læna 25 milliardir dollarar. Uttanlandsskuldin bleiv ovurstór, virðið á landsins gjaldoyra fall nógv, arbeiðsloysið vaks, og fátækradømið breiddi seg kring landið. Tann politiska skipanin bleiv meiri óstøðug, samstundis sum tær sosialu skipaninar viknaðu. Ein sosialistisk minnilutastjórn sat við valdið, og teir ráðandi vórðu støðugt lagdir undir svik og annað óregluligt.

Tann demokratiski gerandisdagurin og dagsins trupulleikar hava ivaleyst stytt fjúsið hjá fólki. Tann veksandi misnøgdin varð vend ímóti tí romanska minnilutanum og jødunum, sum fingu skyldina av teirri syndarligu støðuni, og hesari støðuni hava teir víðgongdu politikararnir á ytsta høgravonginum dugað at gjørt sær dælt av.

## Rasistiskar hugsjónir

Fyri seks árum síðani tóku konservativar kreftir í Fidesz-flokkinum seg saman og stovnaðu Jobbik, hvørs høvuðs-